# Ergo & Hjálpartól víðka um virksemið

**Ergo- og hjálpartólahandilin í J.C. Svabosgøtu í Havn fer í næstum at víðka um virksemið. Nú skal øll niðara hæddin nýtast til handilsvirksemi, meðan ovara hæddin skal nýtast til ergoterapi burturav**

HANDILSTÍÐINDI
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*





Tað verður dúgliga keypt í Ergo & Hjálpartól. Skógvar, stólar, stórir venjingarbóltar og pilatesdvdir eru vørur, ið alskyns føroyingar støkka inn á gólvið at keypa. Og nú er virksemið vorðið so stórt, at kjallarin í handilsbygninginum er vorðin ov lítil.

-Vit hava avgjørt, at vit hava brúk fyri ovaru hæddini í húsunum eisini, av tí at vit hava so deiliga nógvar kundar. Nú verður ergoterapiðin, ið vit høvdu á somu hædd sum handilin, flutt upp á, sigur eigarin av Ergo & Hjálpartól, Beinta við Sandá Lassen.

**Fitness selur væl**

Tað er ongin ávís vøra, ið er toppseljari í Ergo & Hjálpartól. Tó ganga ymsar vørur betur enn aðrar. Terapeutiskir skógvar í alskyns litum selja væl, júst sum ymsir kontórstólar, ið ein situr so væl í, at teir eisini verða brúktir til at trilla kring um í køkinum. Eisini sær tað út til, at fitnessrákið eisini er við at vinda upp á seg í Føroyum.

-Vit selja sera nógvar venjingardvdir av eitt nú pilates. Eisini selja vit nógv av teimum stóru venjingarbóltinum. Fólk, ið keypa hesar vørur, keypa tær ikki einans til venjingar, men eisini til at styrkja um lendar og rygg, sigur Beinta við Sandá Lassen.

Víðkanin av Ergo & Hjálpartól skal eftir ætlan verða liðug í mai mánað.

# Caféin í Miðlon í nýggjum Hami

**Grón hevur yvirtikið caféina í Miðlon, og hevur hon fingið navnið Café Grón. Nýggju eigararnir lata væl at, teir fyrstu dagarnar teir hava havt opið**

HANDILSTÍÐINDI
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Eigararnir í Grón sóu ein stóran møguleika í caféini í Miðlon, tá ið tað frættist, at har varð leita eftir nýggjum fólki at reka caféina.

-Vit hava útvegað nógv av vøruni til caféina, so tá ið leitað varð eftir nýggjum fólki slóu vit bara til. Tað ger tað heldur ikki verri, at caféin liggur beint við bakaríðið hjá okkum, sigur Svein Thomasen, ið er ein av eigarunum í Grón.

Umframt vanligan cafémat, fer Grón eisini at selja døgurða, og teir vænta nógvar kundar.

-Vit meta, at vit skuldu havt grundarlag fyri einum stórum kundaskarða. Her eru nógv arbeiðspláss rundan um, so vit vænta nógv arbeiðsfólk. Eisini eru nógvir kundar í Miðlon, og vit vænta, at teir koma inn í caféina at keypa sær ein góðan kaffimunn, sigur Sveinur Thomasen.

**Víðkað cafémentan**

Sveinur metir avgjørt, at hóast tað eru nógvar caféir í Tórshavn, so er avgjørt pláss fyri fleiri.

-Tað er komin ein nýggj cafémentan til Føroya, og tað vindur bara meira og meira uppá seg, at man fer út at drekka sær ein kaffimunn. So vit meta, at vit hava ein marknað at metta, sigur Sveinur Thomasen.

Grón fara sjálvir at útvega allan matin til caféina. Umframt leiðaran Hannu Haraldsen fara tvey onnur starvsfólk at starvast í Café Grón.




# Mótarák nú eisini til smábørnini

**Nýggi handilin í Miðlon, BabySam, selur alskyns vørur til smábørnini og mammurnar, og tað er ikki heilt sørt, at mótarákið ger seg galdandi eisini innanfyri henda ídnað**

HANDILSTÍÐINDI
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Danska smábarnaketan BabySam hevur fingið fótin inn á føroyska marknaðin. Ein BabySam handil hevur júst latið upp í Miðlon, og tað gongur bara væl at selja barnavognar, puslibord, barnasengur og alla aðra útgerð, ið eitt smábarn og ein nýggj mamma kann ynskja sær.

-Tað er ilt at siga, júst hvat vit selja mest av. Men um foreldrini kom inn at keypa eina song, so kemur tað fyri, at tey eisini keypa madrassuna og seingjarklæðini frá okkum. So tey fáa ein ágóða av at keypa alt á einum stað, sigur Erika Nielsen, ið er leiðari í BabySam.

Tað er aldursbólkurin null til trý ár, ið BabySam serliga leggur seg eftir, umframt ymiskt ein smábarnamamma kann ynskja sær. Og Erika er ikki í iva um, at tað er pláss fyri teimum á marknaðinum.

-Vit vita, at tað finnast aðrir handlar av hesum slag í Føroyum, men vit meta avgjørt, at tað ger onki, um børnini og mammurnar fáa enn størri úrval at velja í. Vit hava í hvussu so er ikki mangla viðskiftafólk hesar fyrstu dagarnar, sigur Erika Nielsen.

**Móti og merki ger seg galdandi**

Mótarákið er so smátt eisini við at gera um seg í smábarnahandlum. Sum árstíðirnar skifta, so skiftir vøran eisini snið og litir. Hetta ger seg eisini galdandi hjá BabySam.



-Í løtuni eru frískir litir hægsti móti. Reyðir og grønir barnavognar eru eitt nú sera inn. Teir frísku litirnir gera seg helst galdani nú, tí vit ganga móti ljósari og frískari tíðum, sigur Erika Nielsen.

Eisini merkið á barnaútgerðini hevur nógv at siga, og her er BabySam eisini væl við.

-Sjálvsagt selja við nógv BabySam, men eisini Odder og Brio eru væl við, sigur Erika Nielsen at enda.